Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Føroyska skattatrýstið

## *Oddagrein*

Føroyingar hava eitt á leið 10% lægri skattaprosent enn danir, soleiðis at skilja, at Hanus og Janus í Føroyum gjalda eitt lægri skattaprosent enn Jensen og Hansen í Danmark. Hetta er ikki torført at skilja, um tað so er Poul Nyrup Rasmussen, sum sigur tað.

Tað sær ógvuliga ósømiligt út, at landsstýrismenn ganga og ákæra ein stjórnarleiðara — tað veri seg danskan ella úr onkrum øðrum landi — fyri at spreiða ósannindi. Omanfyristandandi útsøgn kann ikki afturvísast. Vísundaliga er talan um tað korrigeraða skattatrýstið. Um man roknar skattatrýstið eftir einum øðrum leisti, so ber til at fáa eitt øðrvísi úrslit. Fíggjarmálastýrið er komið fram til, at modifiseraða skattatrýstið er 2% lægri í Danmark enn í Føroyum.

Modifiserað skattatrýst merkir bert, at man tekur uppí, hvussu nógv borgarar (ikki neyðvendigvís teir somu einkultpersónarnir, sum gjalda) fáa aftur av skattinum sum stuðul og aðrar veitingar.

At føroyingar hava eitt høgt modifiserað skattaprocent merkir bert, at tað er ikki serliga nógv umfordeiling í føroyska samfelagnum í mun til tað danska. Hví ikki bara forsøma sosialar veitingarskipanir uppaftur meiri? So kunnu vit fara niður á Christiansborg við einum modifiseraðum skattaprosenti, ið næstan er tað sama sum tað korrigeraða skattaprocentið og so fara at pástanda, at skattaprosentið í Føroyum er næstan 15% hægri enn tað danska, hóast danskarar gjalda bæði ognarskatt og annan skatt, ið vit ikki hava her í Føroyum.

Føroyingar gjalda eitt lægri inntøkuskattaprosent enn í Danmark. Nú hevur tað eydnast landstýrinum at skapt uppmerksomheit um hetta niðri, neyvan til gagns fyri føroyingar. At føroyskir skattgjaldarar fáa lítið fyri sínar skattapengar, tá hugsað verður um sosialar veintingar, er ikki nakað at vera framúr errin av og ringt er at síggja, hvussu hetta kann gagna nakrari fullveldissøk.

Háinntøkuborgarar eru ikki teir, ið móttaka stórvegis sosialar veitingar, og tí er spurningurin, um nettoskattaprosentið í Føroyum ikki sigur, hvussu illa tað er statt hjá móttakarum av almannaveitingum. Vit mugu ongantíð gloyma, at tað eru fólk í samfelagnum, ið av heilsuávum ella øðrum áðum tørva stuðul frá landinum, men ikki kann sigast, at tað er ein ovurstórur partur av landskassans skattainntøkum, ið fer til hettar endamál.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Demokratiskt undirskot í felagsskapinum

EU-felagsskapurin og EVRAN eru í dag veruleikar, sum vit føroyingar noyðast at fyrihalda okkum til – alt annað er vanligt føroyskt møsn.

Tað er líkamikið, hvat vit føroyingar halda um evruna, og tí er tað so eisini óneyðugt fyri okkum føroyingar at halda fólkaatkvøðu herum. Okkara fullveldispolitikarar hava biðið donsku stjórnina um loyvi at fylgja tí danska gjaldoyranum, óansæð hvussu tað eitur.

Hví hava okkara fólk gjørt so, tey tey vita, at føroyska krónan einsamøll hevur ongan kjans at standa seg. Øll føroyskt uppsparing hevði verið burtur eftir stutta tíð, eins og tað gekk í Íslandi eftir 1918 og heilt fram til okkara tíð.

Hettar skilir løgmaður sjálvandi, annars var hann ikki rættur fólkafloksmaður; tí flokkinum hava milliónirnar altíð stýrt. So kunna vit annars ivast í skili løgmans í ríkisrættarmálinum eftir førimuni.

Tá løgmaður so annars fer at møsna um ógreið ríkisfelagsviðurskifti – samstundis sum fullveldisfólkini biðja Danmarkar ríkið um gjaldoyrasamstarv og annars lova at uppfylla EU-krøv fyri valutasamstarvi – ja so haltar logikkurin. Tí vit høvdu ikki fingið greiðari viðurskiftir, um fólkaatkvøða var her í Føroyum ella í Grønlandi saman við Danmark um EU-limaskap ella um EU-gjaldoyra?

Nei, verunleikin er tann, at Føroyar og Grønland kunnu sjálvi velja at vera uttanfyri EU-felagið, men innanfyri EU-gjaldoyra, um Danmark velur hettar. Vit noyðast at fylgja Danmark í hesum.

Hettar er einki ógreitt, men einans serrættindir til okkum føroyingar sum ikki einaferð. Og tað er sera demokratiskt fyri okkum.

Annars inniber »demokrati« sama rætt ikki bara einvegisrætt, sum vit føroyingar tíverri ofta sýnast at halda.

At »serfrøðingurin« hjá Tjóðveldinum kemur fram til demokratiskt undirskot fyri okkum í danska ríkinum átti kanska ikki at undra nakran. Hann livir enn undir Kalmaruniónini og bíðar eftir sínum tjóðfundi. Eitt



dømi um, at annars sera klók fólk missa evnini at meta um, orsaka av politiskum áskoðanum – men tað er helst ógvuliga menniskjansligt? Sum frálíður síggja vit ikki skógin fyri berum trøum.

Tað, at vit frítt kunna velja okkara limaskapir og okkara gjaldsoyrasamstarv og annars øll onnur samstørv óheft av hinum pørtunum í ríkisfelagsskapinum, er í mínari verð eitt yvirskot av demokratii í okkara part. Og her er tað Føroya Løgting, sum tekur avgerðirnar.

At okkara fullveldislandsstýri nú biður danska ríkið um valutasamstarv er helst í lagi. At vit samstundis binda okkum til at lúka altjóða fíggjarlig og búskaparlig krøv er helst ein neyðug avleiðing, tó tað kann koma at skerja okkara fríu møguleikar á hesum økinum í framtíðini. Men at loysingarfólk enntá biðja um at fáa Danska Fíggjareftirlitið at vera ansingarstovn okkara, ja, tað mann undra mangan føroying og vekja kenslur frá byrjanini av nítiárunum.

Tað var so alíkavæl ikki danska Fíggjareftirlitið, sum koyrdi okkum á húsagang í 1992, so sum loysingarfólkini hava prædika? Jú, hundur er kendur fyri at eta, tað hann sjálvur hevur havnað?

Tó gjaldsoyrasamstarvið við Danmark sleppa vit ikki undan, óansæð um vit føroyingar stemma fyri fullveldi her og nú, ella sjálvstýri nú, og so taka støðu til fullveldið seinri. Men tað má sigast at vera sera demokratiskt, at vit sjálvir sleppa at velja, um so verður.

**Birgir Mohr Sandi**

# Grind og fylgisveinar

Góði Andras Joensen.

Takk fyri brævið til mín undir *Meining* í Dimmalætting hin 20. juni 2000. Eg skal svara tínum spurningum eftir bestu evnum.

So skjótt grindahvalirnir eru merktir við fylgisveinasendarum, hava vit tól, sum til eina og hvørja tíð vísa, hvar teir merktu hvalirnir eru staddir. Eg havi eina avtalu við Sjónvarpið um eisini at vísa gongdina við millumbili, og rokni eg við, at eisini bløðini hava áhuga í at vísa hetta. Annars ætla vit eisini at vísa tað í framsýningunum á Náttúrugripasavninum.

Tá ein grind verður funnin, aftan á at hvalirnir eru merktir, er niðanfyristandandi kunngerð nr. 126 frá 23. juni 1997 galdandi. Sostatt skuldi onki tíðarspill verið fyri grindamenninar, tí her verður ikki rópt grindaboð.

Sendararnir eru gjørdir til at kunna senda í eitt ár, og vit vita sjálvandi ikki, um teir merktu hvalirnir halda saman ella spjaðast til fleiri grindir. Tað er millum annað tað, vit skulu kanna.

**Vinarliga**
**Dorete Bloch**

**<u>Kunngerð um friðing av hvali</u>**
Nr. 126 frá 23. juni 1997

Við heimild í § 3 og § 4 í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu, við seinni broytingum, verður fyrisett:

**§ 1.** Grindahvalur og nísa, sum Føroya Náttúrugripasavn hevur merkt við fylgisveinasendarum, eru friðað.

*Stk. 2.* Tá ein ella fleiri hvalir í einum bólki av grindahvali ella nísu eru merktir, sum nevnt í stk. 1, er allur bólkurin friðaður.

*Stk. 3.* Tá grindaboð er, skulu sýslumenn og/ella grindaformenn seta seg í samband við Føroya Náttúrugripasavn til tess at fáa staðfest, um grindin er merkt, sum nevnt í stk. 1.

*Stk. 4.* Verður staðfest, at grind er merkt sambært stk. 1, skulu sýslumenn og/ella grindaformenn gera vart við, at forboð er fyri at drepa grindina og syrgja fyri, at grindaboðini ikki verða givin víðari.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

# Framsýning á Sandi

*Mikudagin og hósdagin 28. og 29. juni verður stór og fjølbroytt framsýning í Flakavirkinum á Sandi*

Mikudagin og hósdagin 28. og 29. juni skipar Kjølbro Heilsøla fyri stórari framsýning í matstovuni í flakavirkinum á Tvøroyri. Frá tí at heilsølan byrjaði sítt virksemi, hevr tað verið heilt náttúrligt at bjóða fiskiflotanum alla ta vøru og útgerð, sum hoyrir skipum til. Hetta hevur so ført við sær, at Kjølbro Heilsøla er blivin ein leiðandi heilsøla, tá tað snýr seg um fiskiflotan. Á framsýningini, sum er meira ætlað sjófólki, reiðaríum, virkjum og handlum, verður nógv at síggja. Av tí at Kjølbro í 99 fekk umboð uppá ta heimskendu oljuna TEXACO, verða sjálvandi vørur frá Texaco at síggja á hesari framsýning. Kjølbro fekk eisini fyrst í 2000 umboð uppá 66 Norð. Hetta er eitt vælkend íslendskt merki, sum selir oljuklæði, dressir, arbeiðsklæði, trygdarskógvar og nógv nógv annað. So 66 Norð verður eisini at síggja á framsýningini. Umframt olju og klæði til vinnulívið kemur Kjølbro eisini at vísa fram knívar frá Frost, húkar frá Mustad, styvlar frá Bekina og nógv, nógv annað.

Í stuttum tíðindaskrivi frá Kjølbro verður sagt, at opið er báðar dagarnar frá kl. 17 til 21.00.

# Eldradagur ár 2000 í Skopun

Leygardagin 8. juli verður hildin eldradagur í Samljóð í Skopun frá kl. 9 til 18.

Kostnaður 150 kr. fyri hvønn luttakara.

Nærri upplýsingar fáast frá Landsfelag Pensjonistanna á tlf. 441396, 444191 ella 444122.

Fráboðan til luttøku má vera í seinasta lagi fríggjadagin 30. juni, sigur nevndin í pensjónistafelagnum.






Ynskir tú at tryggja framtíð tína við langtíðar íløgum, so hevur Kaupthing loysnirnar til tín. Fyri einhvørja upphædd kanst tú gera íløgur í kendar og álítandi fyritøkur á altjóða stigi. Tosa við okkum og vit finna í felag eina loysn, ið hóskar til júst tín tørv.

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355